## Mykines fær gøtunøvn

Navnanevndin í Mykinesi hevur nú latið myndugleikunum eitt álit um, hvussu gørurnar í Mykinesi skulu eita, nú allar bygdir kring landið skulu hava gøtunøvn. Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá mykinesfólki og hjá Fróðskaparsetrinum, sum skal tryggja, at nøvnini eru málsliga røtt. Nú skal uppskotið leggjast fyri bygdaráðið í Sørvágs kommunu. Í navnanevndini í Mykinesi eru Steingrím Abrahamsen, Jákup í Liða og Oskar Joensen.

## Etið meiri fisk!

Ein kanning av brúkaravanunum í Noregi vísir, at fólk brúka altsamt meiri pengar til søtar vørur og leskidrykkir, og at í fjør brúkti eitt vanligst húsarhald meiri pengar til hesar vørurnar enn til grønmeti, egg og mjólkarvørur. Heilsustýrið, sum hevur gjørt kanningina, mælir fólki til at eta meiri fisk, tí fiskur er heilsugóður matur. Kanningin hjá stýrinum vísir, at tað er serliga torført at fáa tað yngra ættarliðið at eta fisk. Tey vilja heldur hava kjøt.

## Skipini fara nú útaftur

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Línuskipini í Klaksvík, sum hava ligið fyri streym og vánalig veðurlíkindi, loysa nú aftur í dag.

Manningin á Klakki skuldi vera hjá skipinum klokkan 10 í morgun, og vit hava skilt, at flestu línuskipini loysa antin í morgun ella tíðliga seinnapartin.

Streymurin hevur verið harður, og veðurlíkindini hava seinastu dagarnar eisini verið vánalig.

Mánadagin og týsdagin var rættiligt illveður.

Í morgun er hann heldur blíðari aftur í veðrinum, og streymurin er avtakandi, sum teir plaga at siga.

Væntandi er tí, at so at siga allur línuflotin í Klaksvík hevur loyst, áðrenn kvøldið kemur.

Nú streymurin tekur av, og veðurlíkindini eru frægari, man lív eisini fara at koma í aftur á Stongunum, har línan hjá flestu útróðrarbátum í Klaksvík verður egnd ella rikin um.

Fugltúgvan, sum vit síggja á myndini, loysir eisini ætlandi nú eftir døgurða, og væntandi ger Grani tað sama.

Jákup B og Ágot gera eisini klárt at loysa.

Á Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík vænta tey, at nakrir dagar ganga, áðrenn nøkur serlig landing verður aftur.

# Eitt rættiligt landingartørn á Kósabrúnni



*At landa skip man vera eitt tað strævnasta arbeiði, sum er. Landingin kemur í tørnum við longum og stævnum døgum. Men tá ið so eingin landing er, hevur tú frí*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Ert tú landari í Klaksvík, kanst tú vænta, at rættiliga nógv er at gera, tá ið skipini koma inn at landa. Landingin er í tørnum, og tá kunnu dagarnir bæði vera langir og strævnir**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánadagin landaði Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík sjey skip.

Ísfiskatrolarin Borgarin, sum partrolar saman við Navaranum, hevði 270 kør – ella eini 160.000 pund.

Navarin landaði hendan túrin í Suðuroy. Skipini eru fyrrverandi Polarhav og Stjørnan, sum vórðu seld úr Leirvík í Vágar, haðani tey eru seld aftur til Klaksvíkar.

Ísfiskatrolararnir, Safir og Smaragd, landaðu eisini í Klaksvík mánadagin. Teir høvdu ávikavist 190 og 245 kør, sum eru eini 250.000 pund tilsamans.

Aftrat trolarunum, landaðu eisini fýra línuskip í Klaksvík mánadagin.

Jákup B hevði millum 75.000 og 80.000 pund, Klakkur 50.000, Ágot 70.000 og Fiskimúli, sum er ein minni línubátur, hevði 26.000 pund.

### Langt tørn

Taka vit seinasta fríggjadag við, landaði Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík eisini línubátarnar, Fugltúgvuna og Grana, sum høvdu ávikavist 90.000 og 80.000 pund í hvør.

Tað er tungt arbeiði at landa skip, og tørnini kunnu vera long. Aðrar dagar er eingin bátur, og tá hevur tú frí. Landingin er í tørnum. Í Klaksvík eru nógvir línubátar og nógvur útróður, tá ið viðrar. Ein stórur partur av flotanum er soleiðis neyvt knýttur at streymi og veðri og harvið kemur eisini landingin í tørnum.

### Støðugir prísir

Pól Fuglø, landingarformaður, sigur, at fiskaprísirnir hava verið rættiliga støðugir í langa tíð, tó at teir kanska eru heldur lakari, enn tá ið teir vóru bestir.

– Toskaprísurin er støðugur og góður og liggur væl omanfyri 20 krónur fyri kilo. Sama kann sigast um miðalprísin á hýsu, sum liggur um einar 12-13 krónur fyri kilo, sigur landingarformaðurin.

# Fjalshamar landar í Klaksvík

**Ísfiskatrolarin Fjalshamar landar í Klaksvík í morgun, og skipð hevur fulla last, 160 kør av upsa**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í dag landar ísfiskatrolarin Fjalshamar í Klaksvík, meðan "makkarin" hjá honum, Nónhamar, landar í Sørvági.

Skipini eru fyrrverandi Akranes og Dragasund, sum P/F Vesturvón átti, men sum áður vóru heimahoyrandi í Saltangará.

Nú eru tey heimahoyrandi í Klaksvík og eru ein partur av skipaflotanum hjá Kósini, Jóhan Páll Joensen og øðrum.

Tað er Landingarmiðstøðin í Klaksvík, sum landar Fjalshamar, ið hendan túrin selir veiðina um uppboðssøluna hjá Fiskamarknaði Føroya.

### Fult skip

Landingarformaðurin, Pól Fuglø, sigur, at Fjalshamar hevur full kør. Skipið hevur 160 kør, sum taka 280-300 kilo hvørt. Tað gevur eina veiðu, sum liggur millum 90.000 og 100.000 pund.

Eins og hjá ísfiskatrolarunum sum heild, er nógv tann støsti parturin av veiðini hjá Fjalshamri og Nónhamri upsi.

Sum skilst, selir Nónhamar ikki um uppboðssøluna hendan túrin, men beinleiðis til virkið í Sørvági.




*Nógv virksemi var undir skipssíðuni og umborð á Fjalshamri í morgun, tá ið Landingarmiðstøð Føroya landaði skipið, sum hevði fulla last*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*